
Veðurtíðindi


Fimmdagaforsøgnin frá DMI




Veðrið í dag:
Lítið lot til frískt lot av vesti og útsynningi, sum frá líður minkar hann vindin til lítið lot av ymsum ættum. Skýggjað ella samdrigið og támut, men yvirhøvur turt. Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið mikudagin:
Fyrst lot av ymsum ættum, men út á dagin veksur hann vindin til hvassan vind av norði og landnyrðingi við ælaveðri, partvís vátaslettingi. Hitin fellur niður í eini 2 hitastig.



Veðrið hósdagin:
Upp í hvassan vind av norði og landnyrðingi, minkandi út á dagin til lot til friskan vind av norði. Skýggjað og ælingur, partvís vátaslettingur ella kavi. Hitin beint omanfyri frostmarkið.




Veðrið friggjadagin og leygardagin:
Fyrst lot til friskan vind av norði, skýggjað og okkurt vátaslettings- ella kavaæli, men út á friggjadagin lækkar hann niður í sunnan og veksur vindin til hvassan vind og tað fer at regna. Hitin kemur upp í eini 5 stig.




Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið í Sosialinum




Millum et lágtrýstøki yvir Íslandi og eitt hátrýst yvir Eystureuropa rekur lyggj luft sunnaneftir móti Føroyum teir fyrstu dagarnar.



Mitt í vikuni verður eitt hátrýst yvir Eysturgrønlandi og tað fer at mennast, so køld luft rekur norðaneftir móti Føroyum. Móti vikuskiftinum kemur eitt nýtt lágtrýst vestaneftir.



Avfallið 8. desember: 8,0 mm.



Minst hita maldur í desember: -10,5° Hægst hita maldur í desember: 13,2°

Illulisat	-16	Lerwick	9	Moskva	0	Athen	13	Miami	22
Nuuk	-10	Aberdeen	10	Berlin	0	Malta	18	Los Angeles	16
Qaqortoq	-6	London	4	Warzawa	0	Tunis	15	Meksikobyur	14
Ammassalik	-9	Tromsø	1	Kiev	0	Beijing	8	Panama	--
Saint John's	2	Bergen	6	Bukarest	--	New Dehli	18	La Paz	12
Halifax	--	Oslo	4	Paris	0	Bangkok	30	Rio de Janeiro	25
Reykjavík	-2	Stokkholm	3	Madrid	11	Jakarta	32	Buenos Aires	25
Seyðisfjørður	-4	Keypmannahavn	1	Róm	11	Sydney	27		
Tórshavn	8	Helsinki	4	Malorca	11	New York	5		

Kelda: DMI

Tiltøk

Meinigheitshúsið, Tórshavn

Í dag, 10. des., kl. 10–11.30: barnagarðs-, dagstovnabørn vælkomin til hugnaløtu.

Í kvøld, 10. des., kl. 20: Bíbliutími um Fil. 3,12-21 v/ Kajberg Davidsen.

KFUK, Tórshavn

Í dag, 10. des., kl. 16: Várgleði (barnadeildin). Adventshugni.

Mikukvøldið 11. des. kl. 19.30: Limafundur v/ Jonu Henriksen.

Hóskvøldið 12. des. kl. 19: Adventshugni hjá skótum og títtlingum.

Samkoman Immanuel

Mikukvøldið kl. 10.30: Møti.

Rhema, Tórshavn

Mikukvøldið: Møti kl. 20.

Sunnudagin: Morgunmøti kl. 10.30.

Øll eru vælkomin.

Hvalvíkar Missiónshús

Ungdómsmøti v/ Martini R. Jacobsen mikukvøldið kl. 20.

Eiði

Mikukvøldið kl. 20 verður Bíbliutími í missiónshúsinum Karmel v/ Emil Olsen, presti. Evni: Jákupsbrævið kapitul 2 og 3. Hóskvøldið kl. 20 verður adventshugni í prestagarðinum. Martin R. Jacobsen, prestur, greiðir frá ferð og vísir ljósmyndir úr Orknoyggjunum.

Møtini í Stokkastovuni

Hósdag kl. 17.30: Barnamøti.

Hóskvøld kl. 20: Evangeliskt møti.

Sunnumorgun kl. 10.30: Møti.

Lívsins Orð á Skálafjørðinum

Samkoman Sion, Vágur

Morgunmøti.

Sunnukvøld kl. 18.00: Evangeliskur fundur.

Mánakvøld kl. 20.00: Bønarfundur.

Hóskvøld kl. 20.30: Bønarfundur.

Forbønartænastan svarar á tlf. 73941 bæði kvøldini meðan bønarfundur er.

Telefonandaktin: 73777.

Jólatrøini í Hvalvík/ Streymnesi

verða tendrað mikukvøldið 11. des. Í Streymnesi kl. 21 og í Hvalvík kl. 21.30. Blandað felagskór úr báðum bygdunum fer at syngja, og Janus Egholm flytur fram røðu.

Javni

Tilhaldið. Leygardagin kl. 14–17: Opið hús. Vit fáa ein drekkamunn.

Skrivstovan er stongd í desember. Ringjast kann til tlf. 16510 ella faxa 10557.

AA-fundir, Tórshavn

AA-fundur í kvøld kl. 20 og AA-kvinnufundur kl. 19.30 -20.30 (í hølinum hjá Al Anon) í Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri).

Al Anon, Tórshavn

Fundur fyri avvarðandi av alkoholikarum verður í kvøld kl. 21 í Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri).

Losjan í Havn

Friggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

Felagið Føroyar-Kuba

Opið er soleiðis í Kongagøtu 11, Tórshavn: Mánadag, týsdag, hósdag og friggjadag kl. 10–12, mikudag kl. 16–18 og leygardag kl. 15–17. Telefon 13016 - Fax 13824.

Evangeliska Røddin

Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Kristnastova

Birmavej 36, København S, tlf. 31 55 18 09 / fax 31 58 61 49.

Friggjakvøldið kl. 20 er kristiligur fundur.

Sunnumorgunin kl. 11 er samkomufundur við breyðbróting og sunnudagsskúli kl. 12.30.

Malta, Hirtshals

Sunnudag:
kl. 11: Breyðbróting.
kl. 13: Sunnudagsskúli.
kl. 18: Evangeliskur fundur.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
2. hóskvøld kl. 19 í hvørjum mánað eru vit í Hygum.
2. friggjadag í hvørjum mánað kl. 19.30 eru vit í Esbjerg.
2. leygardag í hvørjum mánað kl. 19.30 eru vit í Sønderborg Skolehjem, Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti.
Samkoman Malta í Hirtshals

Føroyahúsið í Keypmannahavn

Vesterbrogade 17 A
Tlf. 31 23 15 87, kunningartelefon, ið sigur frá tiltøkum og fax á tlf. nr. 31 23 15 86

Húsið er opið hvønn dag frá kl. 14–19. Leygardag er tó ikki opið.

Kaffistovan er opin hvønn dag frá kl. 14–19.

Hvønn mánadag kl.17–19 er føroyskt sjónvarp á bandi við Degi og Viku og døgurði fæst til keyps.

Ullvørur, bøkur, fløgur og bond og døgurðamatur fæst til keyps.